## SKYN

# Vit taka støði í tykkara tørvi


jon@skyn.fo


maiken@skyn.fo


mildrid@skyn.fo


sigtor@skyn.fo

### KLAKSVÍK
Sethús, Kósabrekka 7




m² 128 · m² 395 · 2 · 1957

Húsini eru í 2 hæddum. Í ovaru hæddini er gongd, baðirúm, køkur/stova og 2 kømur. Í niðaru hæddini er durur, goymslurúm, baðirúm, 2 kømur og fýrrúm/vaskirúm/kjallararúm. Takið og klæðningurin vórðu skift í 1997. Útsýnið er gott.

Prísur úr: kr. 950.000

### TÓRSHAVN
Sethús, Landavegur 90



m² 164 · m² 898 · 2 · 1967

Sethús í 2 hæddum við sera góðum útsýni. Ovara hædd: gongd, køkur, stova við hurð út á altan, baðirúm og 3 kømur. Niðara hædd: durur, gongd, vesi, tekøkur, kamar, stór stova, hjallur og kjallari/fýrrúm/vaskirúm. Dagstovnar, skúlar og handlar eru nærindis. Gott bussamband og góð parkeringsviðurskifti.

Prísuppskot: kr. 1.975.000

### SIGNABØUR
Trøð, Signabøur




m² 9424

Góð trøð á Signabø. Trøðin er 9424 m2 til støddar. Matr. 290a. Parturin niðan fyri vegin er frílendi á 3383 m² og parturin omanfyri vegin er byggilendi á 6041 m². Trøðin liggur í verandi útstykking, og er tí vælegnað til útstykking. Útsýnið er avbera gott.

Prísuppskot: kr. 1.600.000

### TÓRSHAVN
Sethús, Heygskrókur 6



m² 194 · m² 529 · 2 · 1975

Sethús við góðum útsýni. Niðara hædd: durur, gongd, 2 kømur, vesi, baðirúm, køkur, stova, vaskirúm/fýrrúm og hjallur. Ovara hædd: loftsstova, 4 kømur og tekøkur. Vindeyguni vórðu skift í 2005 og baðirúmið nýgjørt í 2004. Urtagarður við trøum og blómum er rundan um húsini. Stutt er til handils og skúla.

Prísuppskot: kr. 2.380.000

### TÓRSHAVN
Sethús, Tinghúsvegur 79



m² 210 · m² 342 · 2

Hús í 2 hæddum nærindis miðbýnum. Niðara hædd: gongd, køkur, stova, kamar og vaskirúm/fýrrúm. Ovara hædd: gongd, baðirúm, goymslurúm og 4 kømur. Nærum alt innan varð gjørt av nýggjum í 2008, og nýggjur tilbygningur varð gjørdur. Eitt nýtt úthús á 50 m² hoyrir til húsini, sum standa í friðarligum umhvørvi tætt við viðarlundina.

Prísuppskot: kr. 2.250.000

### SKOPUN
Sethús, Líðarvegur 7



m² 126 · 3

Sethús í 3 hæddum. Miðhædd: durur, køkur, stova og vesi. Ovasta hædd: gongd, baðirúm og 3 kømur. Niðasta hædd: kjallararúm og fýrrúm. Eitt bilhús við vaskirúmi og hjalli hoyrir til ognina. Eitt fjós á ognini kann fylgja við í søluni. Húsini standa mitt í bygdini og hava nakað av útsýni.

Prísuppskot: kr. 425.000

### ARGIR
Raðhús, undir Kongavarða 120




m² 209 · m² 165 · 3 · 2010

Nýggj endaraðhús við sera góðum útsýni yvir Havnina og út á fjørðin. Miðhædd: durur, hjallur, køkur/stova og baðirúm. Ovasta hædd: loftsstova, baðirúm og 3 kømur. Niðasta hædd: stórt alrúm og vaskirúm. Bilskýli hoyrir til ognina, og haraftrat eru 2 terassur. Dagstovnur og nýggi skúlin á Argjum eru nær við.

Prísuppskot: kr. 3.100.000

### HOYVÍK
Sethús, Mannbrekka 7



m² 200 · m² 1311 · 4

Sermerkt hús við vøkrum útsýni. Uttanfyri er stórur og sera væl hildin urtagarður. Í húsunum er køkur, spísistova, 2 stovur, 4 kømur, baðirúm, klæðnarúm, sjónvarpsstova, 2 skrivstovur, hjallur, fýrrúm, kjallararúm, goymslurúm og vaskirúm. Útgongd er til altan og terassu. Húsini standa nærindis Hoyvíkar skúla, dagstovni og handlum. Bilskýli hoyrir til ognina.

Prísuppskot: kr. 5.000.000

### TÓRSHAVN
Grundøki, Marknagilsvegur




m² 6576

Talan er um eitt óbygt jarðarstykki, sum ikki er útgrivið ella planerað. Vegur er til økið, sum liggur í umráðisparti C3. í 3. grundumráði. Loyvt er at byggja handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki, tænastuvirki, skúlar, almennar stovnar og íbúðir. Matr. nr. 1104d, Tórshavn.

### TÓRSHAVN
Vinnubygningur, Niels Finsens gøta 14



m² 190 · m² 440 · 3 · 1927

Vinnubygningur við loftsíbúð mitt í býnum. Miðhædd: stórt handilshøli. Í íbúðini, sum er í ovastu hædd, er gongd, køkur, brúggers, stór stova, 3 kømur, vesi, baðirúm, hjallur og altan. Niðasta hædd: stórt handilshøli og kontór. Vinnubygningurin stendur sera væl fyri í miðbýnum.

Prísuppskot: kr. 5.000.000

### TÓRSHAVN
Raðhús, Vesturgøta 1



m² 148 · m² 110 · 3 · 1986

Endaraðhús við íbúð í niðastu hædd. Miðhædd: durur, gongd, stova og køkur. Ovasta hædd: gongd, baðirúm og 3 kømur. Í íbúðini niðriundir er durur, gongd, køkur/fýrrúm, stova/kamar og baðirúm. Hjallur hoyrir til ognina. Húsini standa í barnavinaligum umhvørvi, og stutt er til handils, dagstovn og skúlar. Gott bussamband.

Prísuppskot: kr. 1.950.000

### TÓRSHAVN
Íbúð, Vesturgøta 22-101



m² 42 · m² 42 · 1 · 1948

Íbúð í einari hædd. Í íbúðini er gongd, baðirúm, køkur og stova í einum og 1 kamar. Úr køkinum/stovuni er útgongd til terassu. Gott goymslurúm. Felags antennuskipan og vælvirkandi eigarafelag. Stutt er til Handilsskúlan, Tekniska skúla, Skúlaheimið, dagstovn og handil. Gott bussamband.

Prísuppskot: kr. 1.000.000

### VELBASTAÐUR
Grundøki, Gerðisbreyt 34



m² 512

Grundøkið, sum er 512 m² til víddar, er ikki planerað. Økið liggur væl fyri í barnavinaligum, friðarligum og náttúruvøkrum umhvørvi og hevur gott útsýni yvir Sandoynna og Hest. Matr. nr. 24ad, Velbastaður.

Prísuppskot: kr. 480.000

### TÓRSHAVN
Íbúð, Marknagilsvegur 87



m² 68 · m² 73 · 1 · 2003

Góð og ljós íbúð við góðum útsýni. Í íbúðini, sum er á 1. hædd, er gongd, vaskirúm, baðirúm, stova/køkur og 2 kømur. Eisini er skúrur, sum kann nýtast sum goymslurúm. Stutt til Handilsskúlan, Tekniska skúla, dagstovn og handlar. Gott bussamband.

Prísuppskot: kr. 1.450.000

### LEIRVÍK
Sethús, Toftanes 29



m² 320 · m² 716 · 2 · 1972

Húsini eru í 2 hæddum. Ovara hædd: gongd, baðirúm, gestavesi, køkur, stova, 4 kømur, hjallur. Niðara hædd: óinnrættaður kjallari og fýrrúm. Húsini standa niðarlaga í bygdini. Stutt er til handils og skúla.

Prísuppskot: 725.000

### VESTMANNA
Sethús, Toftavegur 17



m² 130 · m² 220 · 2 · 1920

Hús í 2 hæddum. Niðara hædd: durur/gongd, baðirúm, køkur og stova. Ovara hædd: 4 kømur. Vindeygu og klæðningur vórðu skift í 2000, og takið og ketilin eru nýggj. Húsini vórðu bjálvað í fjør, og tá varð baðirúmið eisini gjørt av nýggjum. Hugnaligu húsini standa væl fyri, og útsýnið er sera gott.

Prísuppskot: kr. 850.000

### HOYVÍK
Raðhús, Maritugøta 17




m² 114 · m² 136 · 2 · 2003

Raðhús í 2 hæddum. Niðara hædd: gongd, vesi/vaskirúm, køkur/stova við hurð út á terassu. Ovara hædd: gongd, baðirúm og 3 kømur. Eisini er eitt ovastaloft og úthús/hjallur. Húsini standa í barnavinaligum umhvørvi við spæliplássi og FIFA-vølli. Dagstovnur, býlingshús og skúlar eru nær við.

Prísuppskot: kr. 1.950.000

### TÓRSHAVN
Íbúð, Berjabrekka 185



m² 92 · m² 122 · 2 · 1989

Hugnalig, ljós íbúð í 2 hæddum. Ovara hædd: durur, baðirúm, køkur og stova. Niðara hædd: gongd, vesi/vaskirúm og 2 kømur. Útgongd er til terassu í niðaru hæddini. Møguleiki er at byggja upp í íbúðina. Íbúðin er í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi, og stutt er til handils. Gott bussamband.

Prísuppskot: kr. 1.600.000

SENDISTOVAN

Skyn · Tórsgøta 16 · Tel. 357 400 · Fax 357 401 · www.skyn.fo